## TB sóknast eftir venjara

Aldursforsetin í føroyskum fótbólti, TB, skal aftur í komandi kappingarári royna at vinna pláss í fremstu fótbóltsdeildini – Formuladeildini. Eftir øllum at døma gongur illa at finna venjara til liðið, tí á heimasíðu felagsins søkir TB eftir venjara til 1. deildarliðið. Prógv, sum mininum skal vera B3 og umsøkn kann sendast til Tvøroyra Bóltfelag, box 35. 800 Tvøroyri.

## Vilja gjalda landsliðsvenjara

Norski ríkmaðurin, Øystein Stray Spetalen bjóðar seg til at fíggja helvtina av lønarupphæddini, um norska fótbóltssambandið, NFF setir núverandi meksikanska landsliðsvenjaran, Sven Göran Eriksson í starvið, sum norskam landsliðsvenjara. Spetalen setir tó sum treyt, at ein annar norskur ríkmaður, Tor Olav Trøim fíggjar hina helvtina av lønini hjá Eriksson. Tor Olav Trøim vil tó heldur verða við til at fíggja Alex Ferguson, sum norskan landsliðsvenjara, um Spetalen fíggjar helvtina av tí verkætlanini.

# B36 á veg á húsagang



*Frá at hava verið helst fíggjarliga sterkasta felagið í landinum er B36 upp á fýra ár komið í fíggjarligan brotasjógv*

**Eydnast ikki at fáa akkord-skipan við kreditorarnar, kann B36 væl fara av knóranum. Felagið hevur í løtuni ikki møguleika at svara hvørjum sítt**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í fleiri ár varð B36 mett sum kanska fíggjarliga sterkasta felagið í landinum. Fleiri ár á rað varð talan um stór yvirskot, og eginognin var fyri fýra árum síðani farin upp um fimm milliónir krónur.

Støðan í desember mánaði í 2008 er tó ein heilt onnur. Hóast B36 tvær ferðir á rað spældi seg víðari í europiskum høpi, og harvið vann sær nógvar inntøkur úr UEFA-kassanum, so hevur pengastreymurin úteftir verið munandi størri enn inntøkurnar.

Somikið illa stóð til í summar, at øll nevndin í felagnum varð skift út. Kristjan á Neystabø og Kjartan Mohr vóru av fleiri mettir sum ímyndirnar av fíggjarligu sterku stýringini í felagnum, og teir játtaðu at koma aftur í nevndina, har Edvard Heen gjørdist triði nevndarlimurin.

Missiónin var heilt greitt at skrúva ein fíggjarligan bjargingarpakka saman, men hesin tykist nú vera miseydnaður.

### 15% til ognarar

Í øllum førum hevur B36 sent út skriv til ognarar sínar, har biðið verður um eina sonevnda akkordskipan.

»Eftir at fíggjarkreppan tók seg upp fyrr í ár, og soleiðis sum gongdin í okkara samfelagið hevur verið, er tað vorðið alsamt meira torført at útvega felagnum nýggjan kapital, soleiðis at felagið verður ført fyri at rinda alla skuld sína.

Um felagið skal koma aftur á bein reint fíggjarliga er neyðugt, at felagið eina akkordskipan við vanligar kreditorar«.

Soleiðis verður sagt í skrivinum, har felagið sigur seg vera til reiðar at gjalda 15% av skuld sínari, soleiðis at B36 fíggjarliga kann koma aftur á beint, og kann tryggja framhaldandi rakstur felagsins.

## Útreiðslukarmar mugu setast

**Ávaringarlampurnar hava blunkað í føroyska fótbóltsheiminum í fleiri ár, men higar til hava hesar í stóran mun verið púrasta ignoreraðar**



ÍTRÓTTARKLUMMA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sum tað er nevnt aðrastaðni á hesum síðum, so er fótbóltsfelagið B36 komið í stórar fíggjarligar trupulleikar.

Enn er ikki greitt, um felagið megnar at finna eina loysn á sínum trupulleikum, men tað stendur samstundis rimmarfast, at talan als ikki er um einasta fótbóltsfelag, sum er komið í fíggjarligar trupulleikar.

Ein stórur trupulleiki í føroyskum fótbólti seinnu árini hevur verið, at fleiri av feløgunum als ikki hava tikið atlit til inntøkurnar, tá útreiðslukarmurin er settur. Hóast fá tøl eru almenn, so hevur tað støðugt ljóðað, at talan hálva vegna hevur verið um lønarveitslu hjá spælarunum, tá feløgini í eini fyrilitarleysari kappbjóðing hava royndt at styrkt sær um hópin.

Hjá summum teirra hevur gularótin verið mongu sveisarafrankarnir, sum streyma til føroyameistaran úr UEFA-kassanum, men tað er trupult at finna sær meira enn tann eina meistaran, og tí er sviðurin meinur, um gullið ikki kemur til høldar á hvørjum ári. Og tað í sjálvum sær er nú eisini serstakliga trupult, tá tað á hvørjum ári eru 10 um boðið.

Skulu feløgini sjálvi tackla trupulleikan, er neyðugt, at hesi fyrst og fremst byrja at hugsa longur enn bara um dagin í dag. Tað hava tey ikki megnað higartil, og tí er spurningurin, um Fótbólssambandið ikki eigur at gera greiðar reglur fyri, hvussu hart eitt felag kann spenna seg fíggjarliga. Til dømis við áseting um, at bert ein ávísur prosentpartur av inntøkunum kann nýtast til spælaralønir, ella at skuldarbindingin ikki má vera størri enn ein ávísur partur av eginognini.

Verður hetta ikki gjørt, er avleiðingin heilt víst, at fleiri av feløgunum koma í svára fíggjarneyð. Og tað verður ein støða, sum ikki tænir nøkrum endamáli í føroyskum fótbólti.

# Vilja ikki renna undan

**Kristjan á Neystabø, formaður í B36, er púra vísur í, at onnur feløg hava somu trupulleikar, men at hesi bíða við at tackla hesar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kristjan á Neystabø var í meira enn 20 ár formaður í B36, og tá hann fyri fýra árum síðani legði frá sær, var tað eitt fíggjarliga sterkt felag, sum hann læt eftir sær.

Bara hálvt fjórða ár seinni varð hann tó saman við øðrum garvaðum kreftum kallaður aftur til felagið, sum hevði rent seg fast fíggjarliga.

- Vit eru tríggir, sum nú eru settir í nevndina, og fremsta málið hjá okkum er at fáa greiðu á búskaparligu støðuni hjá felagnum. Har eru vit longu komnir væl áleiðis, og felagið roynir framvegis at svara hvørjum sítt. Ivaleyst høvdu vit eisini megna at halta víðari í nøkur ár afturat, men fyri at fáa slætt borð og fyri at kunna hugsa longur fram, hava vit valt at fara í samráðingar við kreditorar okkara, sigur Kristjan á Neystabø, formaður í B36.

Og hann leggur dent á, at B36 langt ífrá er nakað eindømi í føroyskum fótbólti.

- Eg eri sannførdur um, at tað eru onnur feløg, har støðan í dag er verri, enn hon er hjá okkum. Vit hava tó valt at fara út at tackla trupulleikan. Hvussu hendan royndin so fer at eydnast, veit eg ikki. Men eg eri tó rættiliga vísur í, at B36 eisini er til reiðar at spæla við í fremstu røð í 2009, sigur Kristjan á Neystabø, formaður í B36.